# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**




**FORD ESCORT 1.8 HATCHBACK >> DIESEL <<**
Árg Dec. 96, Km 105.000.
Vælhildin í góðum standi.
Kr. 76.000.



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 >>DIESEL <<**
Árg okt.95, Km 104.500. Vælhildin í góðum standi. Kr. 74.000.



**FORD MONDEO 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Aug.98, Km 90.000.
Vælhildin:Fjarðstýrt centrallás-Aircondition-hiti í setrum-El rútar/spegl v.m.. Kr. 135.000.



**DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR**
Árg Juni.98, Km 29.000. Sera vælhildin. El rútar Fr. Takboylar, Radio við bandspælara, Centrallás, Sleipikrók.
Bert km 29.000. Kr. 94.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX SEDAN**
Árg Mar-97, El. rútar- el. spegl Centrallás-Spoylara- Alufelgur v.m.
Kr. 66.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL**
Árg Okt. 95, Vælhildin . Centrallás -Radio v.bandspælara-El.Spegl v.m.. Kr. 64.000.

P/f. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650



**CHRYSLER VOYAGER 2.4I**
Árg 1995, Km 82.000 .
Kr. 115.000.



**HYUNDAI ATOS 1.0**
Árg Apr'01, Km 22.000 .
Kr. 77.000.



**SUZUKI BALENO 1.3I**
Árg Apr'00, Km 27.500.
Kr. 108.000.



**CITROEN BERLINGO 1.9D**
Árg Okt'99, Km 68.000. Kr. 89.000.



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Juli'97, Km 120.000 .
Kr. 80.000.



**NISSAN ALMERA 1.4I**
Árg Okt'98, Km 64.000 .
Kr. 83.000.



**CITROEN JUMPER 2.5TD LH**
Árg Aug'96, Km 120.000.
Kr. 120.000.



**CITROEN ZX 1.9TD 5H**
Árg Mai'97, Km 160.000 . sýn feb'02. Kr. 85.000.



**CITROEN XSARA 1.9TD**
Árg Aug'98, Km 110.000 .
Kr. 125.000.



**NISSAN SERENA 2.3D**
Árg Mai'97, Km 88.000.
Kr. 92.000.



**CITROEN XSARA 1.9TD WEEKEND**
Árg okt'98, Km 77.000 .
Kr. 115.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo


# Nýggjur landsskjala-vørður settur

**Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur í dag sett Sámal Trónd Finnsson Johansen í starv sum lands-skjalavørð frá 1. januar 2003 at rokna**

LANDSSKJALA-VØRÐUR
*Tíðindaskriv*

Sámal Tróndur Finnsson Johansen er 37 ára gamal. Hann hevur útbúgving sum cand. scient. soc. frá Roskilde Universitetscenter við tveimum høvuðsgreinum, ávikavist í søgu og landalæru.

Bæði sum savnsvørður og sum granskari hevur Sámal Tróndur Finnsson Johansen sera góðan kunnleika og royndir til arbeiði á Landsskjalasavninum.

Av granskingarroyndum kann nevnast, at Sámal Tróndur í tvey ár hevur arbeitt við eini PhD-verkætlan um Føroyar í kalda krígnum.

Landsskjalavørðurin er dagligur leiðari av Føroya Landsskjalasavni, sum er stovnur undir mentamálaráðnum.

Millum høvuðsuppgávur Landsskjalasavnsins kunnu nevnast: At tryggja varðveitingina av savnindum, ið hava søguligt virði og/ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar, at vera ráðgevandi hjá myndugleikum í journal- og arkivspurningum, at umsita arkivavtaluna millum landsstýrið og danska statin, at veita granskarum og almenningi ráðgeving og savnstænastur, at inna gransking í tilknýti til søvnini.


LÝSIÐ
við



brúktum
bilum
í Sosialinum




# SsangYong Rexton RX 290 – jeepur í luksusklassanum




*SsangYong Rexton. Ein heilt nýggjur luksusjeepur. Hans J. Kollsker sýnir her ein Rexton RX 290 við 2,9 litur 5 syl. turbodiesel motori við 118 hk*

**Suðurkoreanska Ssangyong bilverk-smiðjan framleiðir sínar egnu bilar við Mercedes-Benz motorum. Bilverk-staðið v. Hans J Kollsker á Hjalla, ið umboðar bilarnar her hjá okkum, hevur fingið ein heilt nýggjan SsangYong Rexton RX290**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

SsangYong Motor Company í Suðurkorea framleiða sínar egnu bilar við Mercedes-Benz motorum. Teir samstarva við Mercedes-Benz og hava loyvi at brúka teirra motorar í SsangYong bilunum. SsangYong jeeparnir eru ikki helt ókendir her hjá okkum, Musso jeeparnir hava koyrt her í fleiri ár.

Hesin nýggi Rexton er ein stórur og sera væl útgjørdur jeepur við 7 sitiplássum. Tað merkist beinanvegin at talan er um ein bil í luksusklassanum. Hann er sermerktur av útsjónd og ringur at seta í bás. Á intrumentborðinum sæst líkheitin við Mercedes-Benz. Har er tað sum minnir um nøtutræpanelir allastaðni, á rattinum, á instrumentborðinum, í gardanboksini, á girknøttinum og á hurðabetrekkunum.



*Rúturin í baklúkuni kann latast upp fyri seg*

Alt er merkt av gjøgnumførdum kvaliteti.

Við at trýsta á knøttar á instrumentborðinum verður skift millum 2 ella 4 hjólsdrift.

Bilurin vit royndarkoyrdu var ein RX290 við 2,9 litur 5 syl. 145 hk turbodiesel motori og 4-trins automatgirkassa. Rexton fæst eisini við besinmotorum í tveimum støddum: 2,3 litur 4 syl. við 147 hk og 3,2 litur 6 syl. við 217 hk. Bilurin fæst við stoff- og leðursetrum.



*SsangYong innan. Sum í einum týskum bili*

SsangYong Rexton kann síggjast og roynast á bilverkstaðnum hjá Hans J. Kollsker á Hjalla.

## SsangYong Rexton RX290

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,9 litur 5 syl. turbo diesel við 145 hk |
| Oljunýtsla | 11,3 km/ l |
| Dekkstødd | 255/65-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 472,0 cm |
| Breidd | 187,0 cm |
| Hædd | 183,0 cm |
| Eginvekt | 1859 kg |
| Totalvekt | 2550 kg |
| Prísur | kr. 479.000 (7 persóna) |
| | kr. 350.000 (vøruvognur) |
| Søluumboð | Bilverkstaðið v.Hans Jacob Kollsker |
| | á Hjalla |
| | FO-188 Hoyvík |
| | Tel. 311013 |

## Opel Kadett



Opel hátíðarhildu her fyri, at tað vóru liðin 40 ár síðan tann fyrsti Opel Kadett koyrdi út av bilverksmiðjuni í Bochum í Týsklandi.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ikki nóg væl vard



EuroNcap, sum testa hvussu tryggir nýggir bilar eru, hava sagt fleiri bilverksmiðjum frá, at børnini ikki eru nóg væl vard í teirra bilum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## 20. mill. deyð í ferðsluni



Bretska radio- og sjónvarpstøðin BBC kunngjørdi herfyri, at síðan fyrst í 20. øld eru yvir 20. milliónir fólk deyð í ferðsluni.

*Kelda: Motor Magasinet*